# Heimarøktin Vágar Norðstreymoy

### Lýsir eftir summarferiuavloysarum

Søkt verður eftir feriuavloysarum at arbeiða í tíðarskeiðinum 15. juni til 15. september 2003 í skiftandi vaktum.

**Vit søkja eftir heilsuhjálparum at arbeiða úti í Heimarøktini í hesum økjum:**
Vágar – allar bygdir
Vestmanna/Kvívík/Kollafjørður
Sundalagið/Eiði

**Somuleiðis verður søkt eftir heilsuhjálparum og heilsuróktarum at arbeiða inni á hesum eldrasambýlum:**
Korndalsbýlið á Eiði
Eldrasambýlið í Vestmanna
Eldrasambýlið í Kollafirði

Arbeiðið umfatar praktiska og persónliga hjálp til eldri borgarar, og arbeitt verður í tøttum samstarvið við sjúkraróktarfrøðingin í Heimarøktin um brúkarar sum tørva røkt og viðgerð.

**Søkt verður eisini eftir sjúkraróktarfrøðingum at arbeiða í Heimarøktini til Vestmanna/Kollafjørð, Sundalagið/Eiði og til Vágar**

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt spennandi og mennandi starv har arbeitt verður tvørfakligt
- Eitt starv við nøgvum avbjóðingum
- Eitt starv í einum øki sum er í støðugari menning

Meira fæst at vita um størvini við at ringja til økisskrivstovuna á tlf. 333249 ella beinleiðis til økisleiðarin á tlf. 282249.

Ynskiligt er, at umsøkjarin viðmerkir í umsóknina, hvar ein ynskir at arbeiða. Um ikki ber til at arbeiða alt hetta tíðarskeiðið ert tú eisini vælkomin at søkja.

Størvini vera sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. verður at senda til:

**Heimarøktin Vágar/Norðstreymoy**
Økisskrivstovan
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist:** 30.04.03

# Um páskirnar

Framsýningin hjá Føroya Fornminnissavni

***Í Brekkutúni 6 í Hoyvík***

er bert opin 2. páskadag kl. 14-17.

Í summar, frá sunnudegnum 18. mai fram til sunnudagin 14. september, verður opið hvønn dag soleiðis

| | |
|---|---|
| Mánadag til fríggjadag | kl. 10 til 17 |
| Leygardag og sunnudag | kl. 14 til 17 |

**Føroya Fornminnissavn**

# Sethús í Hoyvík



Frálík sethús við góðum útsýni og í barnavinarligum umhvørvi á Djúpagilsvegi 16 til sølu. Bilhús er eisini til 2 bilar.

Húsini eru í tveimum hæddum til víddar umleið 110 m² hvør umframt hjallur 8 m².

Grundøkið er 600 m².

Í ovaru hæddini er køkur, stova, 3 kømur, wc, bað og gongd/trappa til niðaru hæddina, sum er partvís innrættað, men væl hóskandi til at gera íbúð ella kømur í.

Húsini, sum eru frá 1984, eru í góðum standi.

Nærri fæst at vita við at ringja til

**Demmus Hentze, lrs,**
**og Turið Debes Hentze, advokat**
E. Jalsgøta 1, 100 Tórshavn, tlf. 311460

# Tórshavnar Ítróttar- og samkomuhøll

Nú verður aftur høvi at leiga høllina til ítrótt hjá privatum virkjum og feløgum í tíðarskeiðnum millum páskir og ólavsøku á tlf. 311475 millum kl. 08.00 - 16.00.

**Høllin**

# Vakstrarhús til sølu

Vakstrarhúsið inni í Dølum Kirkjubø – húsið er 1200 m².

Áhugað kunnu venda sær til

**Vakstrarhúsið inni í Dølum Kirkjubø**
Tlf. 211853 – 316653

# Stongt vegna feriu

Sjúkrakassin verður stongdur vegna feriu frá 22. apríl 2003 til 29. apríl 2003 og frá 8. mai 2003 til 19. mai 2003, nevndu dagar íroknaðar.

**Sjúkrakassi Vestmanna Læknadømis**

**FØROYA STUDENTASKÚLA OG HF-SKEIÐ**
Hoydalar • Tórshavn • Føroyar
Tlf. +298 312973 • Fax +298 318624

Frá 1. august 2003 at rokna verða **7-9** ársvikariatir leys at søkja í hesum lærugreinum:

**lívfrøði, donskum, enskum, evning, alisfrøði, føroyskum, søgu, ítrótti, støddfrøði, samfelagsfrøði og týskum**

treytað av faksamansetingini hjá umsøkjarunum. Umsøkjarar eiga at gera vart við, hvørjar aðrar lærugreinir teir hava undirvísingarførleika í. Umsøkjari, ið ikki hevur lokið prógv í námsfrøði fyri setanardagin, skal taka lut í innleiðsluskeiði í námsfrøði, sum Mentamálaráðið skipar fyri í august í 2003 – í viku 33.

Í sambandi við starvsetanina leggur skúlin dent á, at umsøkjarar hava kunnleika um føroyskt mál og føroysk samfelagsviðurskifti, og at umsøkjarar eru áhugaðir í at ogna sær hetta innlit. Skúlin leggur somuleiðis dent á, at umsøkjarar virknir fara at taka lut í menningini av einum góðum námsfrøðiligum skúlaumhvørvi, har samstarv, kunningartøkni og nýggir arbeiðshættir eru týðandi tættir.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um skúlans stevnumið, um teir venda sær til leiðslu skúlans ella kunna seg á heimasíðu skúlans: www.hoydalar.fo.

Umsókn á oyðublaði frá YF ella GL verður stílað til Føroya Landsstýri, Mentamálaráðið, Tórshavn, men verður sent til:

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**
**att.: Mads Winther, rektari**
**Hoydalar**
**FO-188 Hoyvík**
**Føroyar**

í seinasta lagi 6. mai 2003.

Avrit av próvtøkuskjølum ella útskrift úr próvtøkuprotokoll skulu sendast saman við umsóknini. Setanarsamrøður fara fram miðskeiðis í mai.

# Fundur í Havnar Róðrarfelag

Fundur verður í Havnar Róðrarfelag 25. apríl 2003 kl. 17.00 við hesi dagskrá:

1. Val av fundarstjóra.
2. Frásøgn formansins frá farna árinum.
3. Framløga av grannskoðaðum roknskapi til góðkenningar.
4. Val av nevndarlimum.
5. Val av tiltakslimum.
6. Møgulig uppskot av limum.
7. Ymiskt.

# Urtagarðsarbeiði

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**v/ Mass Jensen, Nólsoy**
Tlf. 32 71 31 – 28 39 53



**FØROYA STUDENTASKÚLA OG HF-SKEIÐ**
Hoydalar • Tórshavn • Føroyar
Tlf. +298 312973 • Fax +298 318624

Treytað av góðkenning frá játtandi myndugleikum verður frá 1. august 2003 at rokna **3-4** føst størv leys at søkja sum adjunktur/lektorur við faksamanseting ætlað til lærugreinaráðið í studentaskúlum og HF-skeiðum. Størvini eru treytað av faksamansetingini hjá umsøkjarunum. Hesar lærugreinir hava serligan áhuga:

**teldufrøði, heimsspeki, føroyskt, geografi, ítróttur, støddfrøði, samfelagsfrøði og spanskt**

Umsøkjarar eiga at tilskila, hvørjar aðrar lærugreinir innan studentaskúla- og HF-skipanina teir hava undirvísingarførleika í. Umsøkjari, ið ikki hevur lokið prógv í námsfrøði fyri setanardagin, skal taka lut í innleiðsluskeiði í námsfrøði, sum Mentamálaráðið skipar fyri í august 2003 – í viku 33. Nýsett starvsfólk skulu sambært føroyskari kunngerð um námsfrøði hava staðið námsfrøðiliga útbúgving í seinasta lagi tvey ár eftir setanardagin.

Í sambandi við starvssetanina leggur skúlin dent á, at umsøkjarar hava kunnleika um føroyskt mál og føroysk samfelagsviðurskifti, og at umsøkjarar eru áhugaðir í at ogna sær hetta innlit. Skúlin leggur somuleiðis dent á, at umsøkjarar virknir fara at taka lut í menningini av einum góðum námsfrøðiligum skúlaumhvørvi, har samstarv, kunningartøkni og nýggir arbeiðshættir eru týðandi tættir.

Gjørt verður vart við tveyárasáttmálan, ætlaður umsøkjarum við vantandi førleika í føroyskum málførleika og vantandi kunnleika um føroysk samfelagsviðurskifti. Tað vil siga, at umsøkjarin verður settur í tíðaravmarkað starv fyri tvey ár. Skúlin rindar kostnaðin hjá umsøkjaranum fyri flyting og ferð fram og aftur millum verandi bústað og Føroya Studentaskúla og HF-skeið. Skúlin endurrindar í mesta lagi 30.000 kr. fyri flyti- og ferðaútreiðslur hvønn vegin – gevið gætur – upphæddin er skattskyldug. Ætlar umsøkjarin at halda fram í starvinum eftir tveyáraskeiðið, skal umsøkjarin søkja starvið av nýggjum á jøvnum føti við aðrar umsøkjarar. Áhugaði kunnu venda sær til skúlan.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um skúlans stevnumið, um teir venda sær til leiðslu skúlans ella kunna seg á heimasíðu skúlans: www.hoydalar.fo.

Umsókn á oyðublaði frá YF ella frá GL verður stílað til Føroya Landsstýri, Mentamálaráðið, Tórshavn, men verður sent til:

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**
**att.: Mads Winther, rektari**
**Hoydalar**
**FO-188 Hoyvík**
**Føroyar**

í seinasta lagi 6. mai 2003.

Avrit av próvtøkuskjølum ella útskrift úr próvtøkuprotokoll skulu sendast saman við umsóknini. Setanarsamrøður fara fram miðskeiðis í mai.






# Almannastovan Stuðulsfólk

Almannastovan søkir við hesum eftir stuðulsfólki. Sum stuðul fær tú eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
- Fylgjarauppgávur
- Stimbran
- Familjuráðgeving
- Umlætting

**Størvini eru hesi:**

**Tórshavn**
**1)** - at stuðla einum 3 ára gomul fjølbrekaðum drongi á allan hátt, við venjingum og spæli og fara við honum til viðgerð. Tímatalið er **20 tímar um vikuna**, skiftandi morgun og seinnapart. Arbeiði er í heiminum hjá barninum og við tilknýti til dagstovn. Neyðugt er, at tann ið settur verður hevur koyrikort.

**Eysturoy**
**2)** - umlættingarfamilja/fólk til 6 ára gamla gentu, **eitt vikuskifti um mánaðin**. Arbeiði fevnir um at umlætta familjuna og arbeiði verður gjørt heima hjá umlættingarfamiljuni/fólkinum. Ynskiligt er, at tann ið settur verður hevur kunnleika til børn við serligum tørvi. Játtanin er fyribils galdandi í eitt ár.

**Norðoyggjar**
**3)** - stuðulsfólk til 7 ára gamlan fjølbrekaðan drong, **5 tímar um vikuna**. Arbeiðið fevnir um at umlætta familjuna. Arbeiðstíðin er skiftandi seinnapartar-, kvøld- og vikuskifti. Játtan er fyribils galdandi í eitt ár.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag í mun til uppgávuna.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Ragnhild Dahl á tlf. 353510, gerandisdagar millum klokkan 09.00 og 13.00, tó ikki mikudag.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu vera Almannastovuni, J. Broncksgøta 27, Postsmoga 3096, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 29. apr. 2003.

**Í umsókníni skal vera tilskila uppgávunummar.**

# Landsstevnan hjá sjómanskvinnuringunum í Føroyum í Nesvík 2-4 mai 2003

**Fríggjadagur 2/5**

| | |
|---|---|
| Kl. 17.30 ............ | Móttøkan er opin. |
| Kl. 18.00- 19.15 ..... | Náttúrði. |
| Kl. 20.00 ............ | Stevnan verður sett. Ole Petersen frá DK talar. Glyvra streingjakór syngur. |

**Leygardagur 3/5**

| | |
|---|---|
| Kl. 09.00 ............ | Morgunmatur. |
| Kl. 10.00 ............ | Bíbliutími við Ole Petersen. |
| Kl. 12.00 ............ | Døgurði. |
| Kl. 15.00 ............ | Medarbeiðarafundur. Inngangur við Torleif J. Frítt orðaskifti um arbeiðið. |
| Kl.17.00 ............ | Náttúrði. |
| Kl. 19.00 ............ | Møti við Sverra Steinhólm. Simony og Amaliel Knudsen syngja og siga frá arbeiði teirra í donsku sjómansmissiónini. |

**Sunnudagur 4/5**

| | |
|---|---|
| Kl. 09.00 ............ | Morgunmatur. |
| Kl. 11.00 ............ | Guðstænasta í Eiðis kirkju við Emil Olsen. |
| Kl. 13.00 ............ | Døgurði. |
| Kl. 15.30 ........... | Skilnaðarsamkoma. Ingolf Johannesen talar og menn úr Sandavági syngja. |
| Kl. 17.30 ........... | Drekka. |

Tekning hjá bygdaformanninum áðrenn mikudagin 16 apríl
Hjartaliga vælkomnar!
**Føroyska Sjómansmissiónin**





